**Jørgen Niclasen**
**løgtingsmaður**
**vegna Fólkaflokkin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 78/2016: Uppskot til samtyktar um tænastumenn, sum eru lærarar og námsfrøðingar**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at gera neyðugar lógarbroytingar sum tryggja, at lærarar og námsfrøðingar, sum eru settir sum tænastumenn, fáa møguleika, eins og aðrir tænastumenn, at arbeiða eftir at teir eru fyltir 67 ár, um teir hava ynski og orku til tess.

**Viðmerkingar**

Pensjónsaldurin er 67 ár. Tað merkir, at fólk kunnu fara av arbeiðsmarknaðinum og fáa fólkapensjón og AMEG, tá tey røkka 67 ára aldri. Tó ber til at arbeiða nógv longur, um ein ynskir tað og orkar.

Næstan øll í almennum starvi hava rætt at arbeiða til tey eru 70 ár, og eftir tað kunnu tey fáa møguleikan í tvey ár í senn, um persónurin og stovnurin eisini ynskir tað.

Undantakið eru lærarar og námsfrøðingar, sum eru tænastumannasettir. Hesir eru tvungnir úr starvi, tá teir fylla 67 ár. Sum skilst, er hetta ein leivd frá kreppuni fyrst í nítiárunum. Hetta má kunna broytast.

Ein aldur avger ikki førleikarnar. Sjálvandi skulu lærarar og námsfrøðingar hava sama møguleika, sum øll onnur í almennum starvi.

Er ynski og orka til tess, eiga hesir eisini at fáa møguleikan at arbeiða eftir 67 ára aldur, júst sum øll onnur í almennum starvi. Um tey hinvegin ynskja at fara frá við pensjón, skal tann møguleikin eisini vera.

Hetta skal vera landið við møguleikum og ikki landið við forðingum.

**Á Løgtingi, 28. februar 2017**

Jørgen Niclasen
løgtingsmaður